

*Hjá kvinnuunglingum gjørdist Sarita K. Hansen úr Miðvágs Róðrarfelag, t.h. nr 1, meðan Amalia Christiansen úr NSÍ, t.v. gjørdist nr 3*



*Jarnbardur hevur prógvað seg sum favoritt aftur í ár. Tær vunnu eisini stafettina fyri 6-mannafør við kvinnum*



*Flestu konufólkini luttóku í stafettakppingunum. Hjá gentum var tað Firvaldur úr Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, ið vann*

# Úrslit frá Fish Fair kappingini í Runavík 2. apríl

**Gentur 12-15 ár, 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 1.45.00 | Sylja Højgaard, | NSÍ |
| Nr 2 | 1.50.03 | Brynhild Nielsen | NSÍ |

**Dreingir 12-15 ár, 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 1.35.03 | Klæmint A. Olsen | NSÍ |
| Nr 2 | 1.42.04 | Oyvindur Lützen | HR |
| Nr 3 | 1.43.06 | Bárður R. Johannsen | NSÍ |
| Nr 4 | 1.44.09 | Bergur Johansen | MR |
| Nr 5 | 1.45.03 | Nikkel Petersen | NSÍ |
| Nr 6 | 1.53.01 | Høgni O. Vesturgarð | H71 |

**Kvinnuunglingar 15-18 ár, 1000 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 3.42.06 | Sarita K. Hansen | MR |
| Nr 2 | 3.49.07 | Sonja í Hoyvík | NSÍ |
| Nr 3 | 3.50.03 | Amalia Christiansen | NSÍ |
| Nr 4 | 3.52.00 | Joan Nielsen | NSÍ |
| Nr 5 | 3.52.04 | Winnie Heinesen | VK |

**Veteranar kvinnur, 1000 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 3.52.00 | Oydis Hansen | NSÍ |
| Nr 2 | 3.54.07 | Ingrid B. Patursson | Tórshavn |

**Veteranar menn, 1000 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 3.19.05 | Sámal Hansen | NSÌ |
| Nr 2 | 3.32.03 | Jógvan E. Jakobsen | Knørrur |

**Kvinnur, 2000 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 7.15.04 | Súsanna Skylv | Knørrur |
| Nr 2 | 8.09.04 | Rósa Maria Johannesen | AR |

**Menn, 2000 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nr 1 | 6.26.03 | Jón Rosenblad | NSÍ |
| Nr 2 | 6.34.00 | Bogi Olsen | NSÍ |
| Nr 3 | 6.35.04 | Jens Mikal Tróndheim | AR |
| Nr 4 | 6.37.01 | Magnus Bjarnason | VK |
| Nr 5 | 6.38.09 | Jákup Zachariassen | VK |
| Nr 6 | 6.39.09 | Símun S. Petersen | HR |
| Nr 7 | 6.41.01 | Brian Hansen | NR |
| Nr 8 | 6.41.08 | Halgir D. Olesen | H71 |
| Nr 9 | 6.42.07 | Suni Mortensen | VK |
| Nr 10 | 6.43.05 | Gudmund Gudmundsson | VK |
| Nr 11 | 6.44.01 | Mortan MortenseN | VK |
| Nr 12 | 6.44.03 | Johannes Olsen | AR |
| Nr 13 | 6.44.09 | Eyðbjørn Mouritsen | AR |
| Nr 14 | 6.46.03 | Gunnar Poulsen | AR |
| Nr 15 | 6.47.02 | Lars Abrahamsen | NSÍ |
| Nr 16 | 6:47:07 | Sigtór Lützen | HR |
| Nr 17 | 6.48.04 | Olaf Vesturgarð | VK |
| Nr 18 | 6:48:05 | Ragnar við Streym | HR |
| Nr 19 | 6.50.00 | Jóan Pauli Lamhauge | HR |
| Nr 20 | 6.52.01 | Magnus Dahl Olesen | H71 |
| Nr 21 | 6.52.08 | Tóroddur Vang | NSÍ |
| Nr 22 | 6.53.00 | Finnur Johannesen | H71 |
| Nr 23 | 6.53.01 | Pætur Johansen | NR |
| Nr 24 | 6.53.09 | Jógvan Jacobsen | HR |
| Nr 25 | 6.54.01 | Gudmundur Danielsen | NSÍ |
| Nr 26 | 6.55.02 | Heini Bendtsen | H71 |
| Nr 27 | 6.57.07 | Jenus í Trøðini | VK |
| Nr 28 | 6.59.08 | Hilmar Sam Lamhauge | NSÍ |
| Nr 29 | 7.00.05 | Magni Brøðraberg | HR |
| Nr 30 | 7.00.06 | Símun Kerá | HR |
| Nr 31 | 7.01.02 | Dia Jacobsen | H71 |
| Nr 32 | 7.05.04 | Øssur Hansen | MR |
| Nr 33 | 7.08.06 | Heini Tausen | VK |
| Nr 34 | 7.09.02 | Ásmund Zachariassen | HR |
| Nr 35 | 7.09.05 | Ólavur í Lágabø | VK |
| Nr 36 | 7.09.06 | Óli Svein Hansen | H71 |
| Nr 37 | 7.09.07 | Ragnar Helmsdal | H71 |
| Nr 38 | 7.13.02 | Áki Hansen | HR |
| Nr 39 | 7.13.03 | Hákun Zachariassen | HR |

**5-mannafør gentur, 6 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 10.35.04 | Firvaldur | FSR |
| nr 2 | 10.41.01 | Drekin | HR |
| nr 3 | 10.46.08 | Fípan Fagra | KRF |
| nr 4 | 11.07.02 | Spógvin | NSÍ |

**5-mannafør dreingir, 6 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 9.19.06 | Drekin | HR |
| nr 2 | 9.27.03 | Sílið | HR |

**6-mannafør kvinnur, 6 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 10.23.09 | Jarnbardur | Knørrur |
| nr 2 | 10.25.03 | Lómur | AR |
| nr 3 | 10.56.05 | Sølmundur | NSÍ |

**6-mannafør menn, 6 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 9.00.09 | Gongurólvur | HR |
| nr 2 | 9.01.08 | Lómur | AR |
| nr 3 | 9.09.01 | Jarnbardur | Knørrur |
| nr 4 | 9:12:05 | Sølmundur | NSÍ |
| nr 5 | 9.25.5 | Smyril | VK |

**8-mannafør menn, 8 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 12.17.08 | Argjabáturin | AR |
| nr 2 | 12.38.05 | Ørvur | HR |

**10-mannafør menn, 10 x 500 m**

| | | | |
|---|---|---|---|
| nr 1 | 14:51:02 | Vágbingur | VK |
| nr 2 | 15.10.00 | Havnarbáturin | HR |
| nr 3 | 15.12.3 | Eysturoyingur | NSÍ |

KÍ-VB 1-1 (0-0):

# Gomul sjúl

**Klaksvíkingar vóru í gamla lagnum á heimavølli, har vágbingar vóru eftir brotsspark á sigurskós, áðrenn KÍ fimm minuttir undan leikloki fekk brotsspark og javnaði**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Teir klaksvíkingarnir, sum undan VB vitjanini høvdu kensluna av, at tað eftir fullu úrtøkuna ímóti HB ikki fór at ganga heilt eftir vild hesa ferð, høvdu ta røttu kensluna.

Tríggjar tær seinastu ferðirnar hevði tað eydnast VB at hava eitt stig við sær úr Klaksvík, og tað eydnaðist eisini hesa ferð.

Vágbingar høvdu fyrireikað seg væl, og teir hildu seg eitt hundrað prosent til tað, sum teir høvdu ætlað sær. Undantakið var kiksarin hjá málverjanum fimm minuttir undan leikloki. Tá gjørdi hann púra óneyðugt brotsspark, og tað hevði við sær, at KÍ javnaði, og at VB harvið ikki fekk fulla úrtøku.

VB uppskriftin var, at teir skuldu taka tað róligt og vera tættir og væl skipaðir. Í sambandi við deyðbóltsstøður nýttu teir ta tíðina, sum teir fingu loyvi frá dómaranum at nýta. Dan Djurhuus var einsamallur heilt á toppinum, og nýggi Nenad Zivanovic var aftanfyri hann. Á sentrala miðvøllinum var Evrad Ble serliga eyðsýndur. Milan Culic er altíð góður, og hesir, saman við Símuni Samuelsen á ytsta miðvallar plássinum í vinstru, stóðu fyri álopspartinum.

Tá ið VB hevði fingið fatur á bóltinum royndu teir viðhvørt at spæla skjótt. Langar sendingar inn um KÍ verjuna bóru fleiri ferðir vandamiklar støður við sær. KÍ verjan tóktist hesa ferð at hava hug til at flyta seg longri fram á vøllin, enn hon plagar at gera á heimavølli, og hetta bar pláss til VB spælið við sær.

Í 1. hálvleiki var eina ferð um reppið, at VB fekk mál. Símun Samuelsen gjørdist leysur, hann setti bóltin framvið KÍ málverjanum, sum kendi seg noyddan at leypa út, men á málstrikuni rakk Niclas Niclasen bóltinum og bjargaði.

Tá ið eitt korter var farið av seinna umfarinum endurtóku vágbingar somu resept. Aftur gjørdist Símun Samuelsen leysur, og aftur kendi KÍ málverjin seg noyddan at leypa út. Hesa ferð royndi VB maðurin at sneiða framvið KÍ málverjanum, sum setti beinið eftir bóltinum. Símun datt, dómarin bríkslaði fyri brotsspárki, og Milan Kuljic umsetti til mál.

Løtu seinni var um reppið, at Poul N. Poulsen, sum hesa ferð allar 90 minuttirnar var miðvallari í høgru, tók luftina úr. Eftir innlegg úr vinstru smekkaði hann til, og tað var vandamikið, men Mattias Samuelsen, sum KÍ venjarin hevði tikið framum Karstin Joensen, ið er komin fyri seg eftir skaðan, bjargaði væl.

### Skeiva beinið fyri

Uppgerðin ímóti VB myndaðist soleiðis, sum klaksvíkingar ikki vilja hava heimadystirnar at gera. Tá ið tað ikki eydnast at fáa mál, so verður spælið meiri